## Vieira til Manchester



Franski miðvallarskiparin, Patrick Vieira, sigst nú vera ávegis til enska stórfelagið, Manchester United. Vieira er annars partur av hópinum hjá Juventus, sum er tvangsfluttur niður í seriua B, og sjálvur sigur miðvallarin, at hann væl kann vera ávegis til Manchester United.

– Ein og hvør spælari vil gjarna spæla fyri eitt felag sum Manchester United. Eftir níggju ár í Arsenal er tað kanska ikki lætt, men í fótbólti kann alt henda.

– Enn veit eg ikki, hvar eg spæli næsta. Eg leiti framvegis eftir einum nýggjum felag, og kanska er ein loysn ávegis innan næstu 48 tímarnar, sigur Patrick Vieira, sum eisini slær fast, at hann ikki ætlar sær at spæla í seriu B komandi kappingarár.

**-mørk**

## Landis illa sperdur

Doping-ákærdi vinnarin av Tour de france, Floyd Landis, tykist standa alsamt veikari í frágreiðing sínum.

Hóast súkklarin sjálvur hevur bedýrað, at høga testosteron-innihaldið í blóðinum hjá sær er eitt náttúrligt fyribrigdi, so er ivasamt, hvørt hetta er allur sannleikin. Í øllum førum skrivar New York Times í dag, at A-royndin sýnir, at talan er um syntetiskt testosteron, og tí er neyvan hugsandi, at hetta er komið av náttúrligum ávum.

Og seinasta frágreiðingin um, at hetta er íkomið av øl og whiskey, sum Landis hevði drukkið kvøldið fyri 17. etapuna, er neyvan nakað, sum verður tikið í fullum álvara.

**-mørk**



Undir trýsti var sjónligt, at leikararnir ikki kenna hvønn nóg væl, og tað sást aftur í, at norska liðið til tíðir hevði rímiliga lætt við at spæla seg í gjøgnum síðurnar báðar.

Føroyar fingu tó altíð vart fyri, tá tað veruliga ástóð og norðmenn sluppu hinvegin at njóta føroyska gestablýdni á vøllinum, tá føroyingar ikki koyrdu bóltin í málið oftari enn hægst neyðugt.

Føroyar - Danmark 0-1 (0-0)

# Mistu í síðstu løtu

**Framman undan dystinum móti dønum, høvdu føroysku leikararnir hildið, at eitt tap áljóðandi 0-1 móti dønum, var eitt frálík úrslit. Men eftir dystin í Klaksvík í gjár munnu teir allar flestu iðra seg um, at teir mistu í teimum seinastu minuttunum**

NM-KAPPING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroysku leikararnir munnu iðra seg nakað nógv, eftir at teir mistu sigurin burtur, tá bert sjey minuttir vóru eftir at spæla. Teir høvdu hildið tætt í samfullar 73 minuttir, men máttu í síðsta enda taka til takkar við einum teprum 0-1 tapi.

Føroyska liðið kom annars væl frá byrjan, og megnaðu teir at standa dønum kurl. Tað var sjónligt, at danska liðið var nakað sterkari enn føroyska, men teir megnaðu ongantíð av álvara at hótta føroyska málið í fyrra hálvleiki, hóast teir vóru spælstýrandi liðið.

Nakrar smávegis mál-møguleikar fekk danska liðið tó spælt seg til, men komu teir ongantíð so nær sum at verða vandamiklir. Í hinum endanum høvdu okkara mans eisini nakrar hálvar kjansir, sum tað tó heldur ikki spurdist nakað munagott burtur úr.

### Merktu møðina

Sum seinni hálvleikur leið byrjaði møðin so smátt at síggjast á føroysku leikar-unum. Danir, sum í fyrra hálvleiki høvdu havt leikliga yvirvág, fingu alsamt betri tak á føroysku leikarunum, har orkan so smátt var við at renna undan.

Tá trýstið bara var alsamt vaksandi fingu danir fleiri hornaspørk, og tað var aftan á eitt tílíkt, at teir kundu leggja seg á odda. Eitt hornaspark varð sent væl innfyri, tá 73. minuttir vóru spældir. Bólturin varð sparkaður aftur og fram, áðrenn ein dani at enda kundi seta hann í málið og leggja Danmark framm um 0-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Pætur Clementsen er venj-ari hjá føroyska liðnum, og hann dylir ikki fyri, at teir nú eftir dystin eru eitt sindur vónbrotnir:

– Tú kanst lítið ætla, at tað er tungt at missa so seint í dystinum, so tað er ikki frítt, at vit eru vónbrotnir. Men samstundis hava vit allatíðina í huganum, at vit framman undan hildu, at eitt úrslit av hesum slag-num var eitt frálíkt úrslit, so samanumtikið eru vit bara væl nøgdir við at hava fingið eina so fræga byrjan upp á kappingina, segði Pætur Clementsen, U17-landsliðsvenjari um dystin móti Danmark.

### FAKTA

**Føroyar - Danmark 0-1 (0-0)**
**0-1:** Morten Nielsen, 74.
Hans Jørgensen - Sámal Jákup Djurhuus, Viljormur H. Davidsen, Heri H. Nesá, Rógvi S. Holm - Erland B. Danielsen, Heini Vatnsdal, Gunleif Olsen, Erling Jacobsen - Klæmint A. Olsen, Páll A. Klettskarð.
Andrias Ellingsgaard, Eli Simonsen, Uni H. Johannesen, Jóhan S. Edmundson, Petur M. Magnussen, André Olsen, Gunnar Thomsen

**Videoupptøkur og samrøður frá dystinum millum Noreg og Føroyar eru at síggja á www.portal.fo**

### FAKTA

Føroyar eru í hesum døgum karmur um NM fyri U17-landslið. Kappingin eru fyri Norðanlond og eru tað fylgjandi sjey lond, sum luttaka: Danmark, Finnland, Ísland, Noreg, Ongland, Svøríki og Føroyar, sum er umboðað við tveimum liðum, tí U19-landsliðið er við sum gestaluttakari, orsaka av at Wales noyddist at geva avboð.

Kappingin fór á rull í gjár og kappast verður í tveimum bólkum – A og B. Fýra lið eru í hvørjum bólki, og teir tilsamans fýra dystirnir í bólkunum báðum vórðu bríkslaðir í gongd samstundis í gjár í Havn, Klaksvík og á Skála.

Dystast verður aftur í dag, týsdagin, og hósdagin á hesum støðum kl. 14.30: Argir, Fuglafjørður, Havn, Klaksvík, Runavík og Toftir. Leygardagin verða finaludystirnir leiktir, og teir skulu allir spælast í Gundali har byrjað verður kl. 11.00.

Av tí, at talan er um eina U17-kapping, er ongin dystur longri enn 80 minuttir. Og teir, sum eru settir at stýra ungu leikarunum meðan spælt verður, eru bæði útlendskir og føroyskir dómarar.

Finnland–Ísland 2–5 (2–2)

## Eitt ordans come-back

Á Skála spældu Finnland og Ísland dyst. Finnland fekk eina dreymabyrjan og aftan á sjey minuttir vóru teir á odda 2-0. Tað vóru teir báðir Tapio Heikkila og Teemu Pukki, sum áttu málini.

Men aftan á skelkandi byrjanina fingu íslendingar fótin fyri seg, og tá fyrri hálvleikur var gott og væl hálvrunnin, svaraðu íslendingar aftur við máli frá Kristinn Steindórsson. Hesin sami Kristinn Stein-dórsson var aftur framvið ein minutt fyri hálvleik, og so var javnleikur 2-2.

Í seinna hálvleiki vórðu finnar blástir av vøllinum fyrstu minuttirnar. Fyrst skoraði Viðar Kjartansson tá ein minuttir var farin, og sjey minuttir seinni økti Viktor Unnar Illugason.

Tá tað restaðu tíggju minuttir skeyt Viðar Kjartansson sítt seinna mál í dystinum, og staðfesti hann sigurin og endaliga úrslitið 2-5.

Harvið megnaði Ísland at gera eitt ordans come-back og vinna dystin, eftir at hava verið aftanfyri 2-0 longu tá sjey minuttir vóru spældir av dystinum.

Ongland–Svøríki 4–2

## Sviar bastu onglendingum

Ovara vøllur í Gundadali legði seinnapartin í gjár gras til uppgerðina millum Ongland og Svøríki. Talan var um eina undirhaldandi og málríka uppgerð, har tað stóð á jøvnum til allar seinasta minutt.

Moses Barnett legði Ongland á odda, tá sjey minuttir vóru spældir. Sviar javnaðu eitt korter seinni, tá Jakob Johansson setti bóltin í netið.

Ongland yvirtók skjótt leiðsluna aftur, tá Rhys Murphy skoraði til 2-1. Hetta var í 29. minutti, men longu í 31. minutti javnaði Ivo Pekalski aftur fyri Svøríki.

2-2 sá eisini út til at verða endaliga úrslitið, tí tá farið var undir seinasta minuttin stóð framvegis á jøvnum.

Men so var tað, at Adam Smith og Jack Ainsley skoraðu hvør sítt mál beint áðrenn dómarin bríkslaði fyri seinastu ferð, og harvið gjørdist endaliga úrslitið 4-2 til Ongland.